# Kjak



**Edmund Joensen**
*løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin*

# Góði Aksel

*Vit eru nógv, sum fegnast um, at tú sum formaður í Javnaðarflokkinum hevur sett tær fyri at endurskapa flokk tín sum ein samríkisflokk og at sleppa fullveldiskósini, ið kostar Føroyum inntøkur, vælferð og framgongd*

Lógvabrestir. Nógvir lógvabrestir. Í rúma tíð.

Reaktiónin hjá javnaðarfólkum á landsfundi um vikuskiftið var týðilig.

Tað sóu og hoyrdu vit, sum høvdu høvi at fylgja javnaðarfundinum á internetinum.

Hvøllu lógvarbrestirnir hoyrdust, eftir at nývaldi formaðurin, Aksel Johannesen, í fyrstu formansrøðu síni staðfesti hetta:

»Javnaðarflokkurin er ein samríkisflokkur, sum ikki vil seta vælferðina í vanda fyri at fáa fullveldi«.

Lógvabrestirnir fyltu tann fullsetta salin í Norðurlandahúsinum.

## Uppgerð við fullveldisrákið

Góði Aksel, hetta eru vís orð, og vónandi býr álvari aftan fyri tey. Tá hevur tú av røttum sett út í kortið av nýggjum fyri Javnaðarflokkin.

Vit eru fleiri, ið halda okkum síggja, at tú sum leiðari ætlar at gera upp við eitt 10 ára drúgvt fullveldistíðarskeiðið í flokkinum. Nýggja stavnhaldið má metast at vera víðskygdari enn tann politiska hugsanin, sum eftir øllum at døma endar við formansskiftinum leygardagin.

Sonevndir »politiskir viðmerkjarar« skulu sjálvandi takast við einum ávísum fyrivarni. Men eg hugsi, at onkur teirra hevur rætt í, at 10 ára afturgongdin hjá Javnaðarflokkinum hongur neyvt saman við, at flokkur tín hevur verið meira fullveldisorienteraður, enn veljarar floksins vilja.

Tí er undirtøkan fyri stóran part komin yvir til okkara í Sambandsflokkinum.

Javnaðarfólk vita, at fullveldi kostar vælferð.

Vit eru nógv, sum fegnast um, at Javnaðarflokkurin nú vónandi aftur verður at finna millum okkara, ið síggja Ríkisfelagsskapin sum ein náttúrligan og góðan part av føroyskum politikki. Javnaðarflokkurin hevur fyrr ríkið politikk saman við Sambandsflokkinum, ið hevur givið sera góð úrslit.

Seinastu 10 árini hava vit í Sambandsflokkinum verið einasti garantur fyri, at Føroyar ikki spæla sær av við møguleikarnar fyri at skapa vælferð og menning innan karmarnar av Ríkisfelagsskapinum.

Hetta hevur verið eitt heldur einsamalt og tógvið stríð, bæði her heima og í Fólkatinginum.

## Felags høvuðsmál

Eitt er at hava ætlanir í einari røðu. Annað er at fremja ætlanirnar í verki.

Um álvari liggur aftan fyri sjónarmið títt um, at Javnaðarflokkin er ein samríkisflokkur, so eru fleiri felags mál, ið Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin kunnu samstarva um frameftir.

Man kann síggja stórt uppá, hvar samríkisatkvøðurnar eru. Tað mest týðandi er, at skilagóður samríkispolitikkurin verður framdur.

Mest átroðkandi er at stýra Føroyum burtur úr óvanliga afturhaldssinnaða rákinum, ið hevur merkt landið, síðani stýrið hjá fullveldismonnum kom til valdið í 1998.

Enn hava Føroyar ikki endurvunnið sítt trúvirðið, og tí mugu hóvligar kreftir frameftir stýra landinum við seriøsum politikki.

Náttúrliga samstarvið í Ríkinum má normaliserast, og við sunnari fornuft fáa vit økt vælferðina og framtíðartryggjað okkara samfelag innan góðu karmarnar av Ríkisfelagsskapinum.

Hetta kunnu Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin uttan iva samstarva um.

## Fleiri ítøkilig mál

Ítøkiliga síggi eg fyri mær eina røð av málum, ið flokkar okkara hava felags interessu í at loysa við sunnari fornuft og við skilabetri og bíligari rakstri fyri eyga.

**Her eru nøkur teirra:**

- Samstarvið í Ríkisfelagsskapinum eigur at mennast, og ítøkiligar felags verkætlanir skulu geva góð úrslit fyri føroyingar
- Ætlaða stýrisskipanin má fáast í samsvar við Grundlógina, Heimastýrislógina og limaskap Føroya í Ríkisfelagsskapinum
- Inntøkurnar til landskassan mugu økjast við at strika fastfrystingina av Ríkisveitingini
- Samrøður mugu verða við stjórnina um at tillaga støddina á Ríkisveitingini
- Allar yvirtøkur mugu steðga í stundini, tí tær tyngja landskassan við øktum og óneyðugum útreiðslum
- Aðalráðini mugu skerjast úr 9 niður í 6. Herundir skal Uttanríkisráðið niðurleggjast og uttanlandsmál leggjast undir løgmann, har tey hoyra heima
- Landsstýrið má fylgja tilráðingum frá Búskaparráðnum um at leggja eina miðvísa ætlan við ítøkiligum málum fyri, hvussu almenna hallið skal fáast burtur
- Veruligur Europapolitikkur skal tryggja, at Føroyar kunnu gerast partur av Europasamveldinum, so fyritøkur fáa nýggjar møguleikar at vinna pening heim til Føroya
- Landið skal skipast í kraftdeplar. T.d. mugu kommunur leggjast saman og undirvísing savnast í kraftdeplar
- Eitt felags sjúkrahús til øll. Her má rationaliserast og trimmast, so vit øll fáa sum mest av fyribyrging og heilsuviðgerð fyri pengarnar

## Skipa ein samríkisblokk?

Góði Aksel, sum tú sært, eru nógvir møguleikar hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum at økja um vælferðina og steðga afturgondini, sum hevur verið í fullveldisrákinum.

Í veruleikanum eru ótømdir møguleikar hjá Føroyum innan fyri Ríkisfelagsskapin. Tað, ið krevst, er, at vit í felag ganga røttu leiðina. Uttan at taka atlit til óseriøsan afturhaldsretorikk frá flokkum og politikarum, sum vilja ofra alt fyri fullveldi.

Røddir hava verið frammið um at skipa politiskar flokkar í blokkar, eins og gjørt verður í øðrum londum. Tankin um at skipa ein Samríkisblokk millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, og at fara til val í hesum blokki, er ikki ringasta hugskotið.

Á henda hátt vaska vit talvuna reina og byrja eitt nýtt tíðarskeið, har hóvligur samríkispolitikkur skapar framgongd og vælferð í Føroyum.

Tillukku Aksel og góða eyðnu í formansstarvinum.



**Heri Mohr**

# Um satiru

*Tað stóra, rómverska, satiriska skaldið D. J. J. Juvenal (føddur sama árið, uml.65, sum apostilin Pætur leið martyrdeyðan í Rom) gjørdist kent fyri satirirnar, hann skrivaði í tíðini umleið 110-130. Yrkingarnar ríma ikki, heksametur, sum óivað var vanligt tá í tíðini. Tær flestu yrkingarnar hava eini 100 vers hvør. Nr. 6, tann longsta – um kvinnur – hevur 661 vers*

Satirurnar snúgva seg um fólk í skaldsins samtíð og teirra veikleikar. Pallurin er stórbýurin, Rom. Við beiskari og kraftmiklari yrking um grumleika hjá fólki og lemjandi peningavaldi við sjónskari ábending til innflytarar, ið streyma til Rom úr øðrum londum, avmyndar Juvenal ferðslutrupulleikarnar, tær vánaligu íbúðirnar, tey homoseksuellu, kvinnurnar, ótrúskap og sex. Hansara satiriska svartskygni um samfelagið melur um forfall og siðaloysi.

Juvenal avmyndar fyribrigdi í Rom fyri 2000 árum síðani, sum tykjast at vera tey somu, óbroytt nú á døgum – eisini um okkara leiðir.

Í 10. satiruni um stórbýin eru tey so ofta brúktu orðini: "Ein sunn sál í einum sunnum likami" ("Mens sana in corpore sano.") Og "Breyð og sjónleikur" ("Panem et circenses").

Juvenal hevur havt stóran týdning fyri satirisk skøld, eitt nú Holberg. Tað er als ikki óhugsandi, at Nólsoyar Páll onkursvegna visti um Juvenal og hevur verið ávirkaður av hansara satiru. Hetta kemur til sjóndar í kvæðunum Jákup á Møn og Fruntatátt: "...ein Kleopatra og Bernissa, hvørgin av teimum brúktu frunt."

Tað er ósmæðið av undirritaða alment at leggja seg út við hugleiðingum um Decimus Junius Juvenalis Juvenal, sum eg einki, avgjørt einki, veit um. Ein tilvildarlig skeiting undir J í einum leksikoni gjørdi meg varugan við navnið á skaldinum, og tað gav mær hug til at skriva hesi fáu orð.

Í 1947 var eg saman við háskúlafólki á einum háskúla í Danmark. Teirra millum var presturin Johs. Sløk, sum seinri gjørdist ein víðagitin professari. Tey prátaðu eina ferð á skúlanum um lærarar og annað, ið stóð háskúlum nær. Eg minnist, at ein tosaði um "frelste seminarister med delingsføreruddannelse." Hesi orð runnu mær í hug, nú Føroya Skúlagrunnur hevur ilt við at skilja tað, ið stórt tal av okkara væl skúlaðu fólkum – fleiri av teimum teljast millum tey frægu – ávara alment um, hvussu grunnurin arbeiðir við at geva út eitt nýtt atlas. Tey, ið manna grunnin, tykjast ikki at skilja ella vilja kanska ikki skilja tað, sum serkunnleikin so staðiliga ger vart við og ávarar ímóti – uttan tó at verða hoyrd ella at fáa neyðugu og sjálvsøgdu ávirkan í avgerandi spurningum.

Er hetta ikki harðrent og ósmæðið?

Kann ein hægri myndugleiki ikki fáa hetta fyri okkara skúlaungdóm og allar føroyingar yvirhøvur so týðandi mál í eina forsvarliga legu? Eigur landsstýrið ikki at skera ígjøgnum, meðan tíð er, og áðrenn snævurskygni hevur gjørt óbótaligan skaða? Fáið atlassið og teir 5 latínsku bókstavirnar í okkara alfabeti frá hondum skjótast gjørligt!